# Nøvn

# Gevst eftir trúgva tænastu

**Nógv fólk vóru til móttøku leygardagin, tá Jákup Sólstein, skrivstovumaður og fyrrverandi formaður í Føroya Reiðarafelag gavst í starvinum hjá JFK-Troli í Klaksvík**


*Fríggjadagin var móttøka fyri Jákupi Sólstein, sum hevur verið skrivstovumaður hjá JFK-Troli í eina hálva øld – og sum annars er kendur sum formaður í Føroya Reiðarafelag*

Vilmund Jacobsen

At Jákup Sólstein hevur neglt sítt navn í føroyska fiskivinnusøgu, var stórfingnað móttøkan í Klaksvík í kantinuni á Kósavirkinum seinasta fríggjadag eitt týðiligt prógv um. Hann er nú farin um tey sjeyti og mynstrar av sum skrivstovumaður hjá JFK-Troli, har hann hevur verið í starvi í meiri enn eina hálva øld.

Nógv fólk úr ymiskum heraðshornum innan føroyska fiskivinnu, vinnulív og eisini innan politisku skipanina heilsaðu Jákupi Sólstein, og fleiri nýttu eisini høvi at bera fram heilsan.

Maðurin, sum hevur verið í starvi hjá JFK-Troli øll hesi ár, er serliga kendur um landið fyri tey árini, hann var formaður í Føroya Reiðarafelag og soleiðis stóð í andglettinum, sum fremsta umboð fyri føroysku reiðarararnar.

Óli Jacobsen, sum var formaður í Fiskimannafelagnum øll árini, meðan Jákup Sólstein var formaður í Reiðarafelagnum, helt eina skemtiliga røðu og vísti á, at hóast teir báðir høvdu verið í mongum hørðum leiki, kennast teir í dag sum vinir.

Sjálvur segði Jákup Sólstein eisini nøkur orð við móttøkuna og helt fyri, at hann altíð hevði fingið góðan uppbakning frá konu síni í tí, hann hevði fingist við. Men hóast allan hendan stuðul, hon hevði veitt manni sínum, noyddist hann sjálvur einaferð at langa nevan í borðið, sum hann tók til.

– Tað var, tá konan kom og fortaldi mær, at hon nú var vorðin nevndarlimur í arbeiðskvinnufelagnum. Tá mátti eg langa nevan í borðið, segði Jákup Sólstein.

Men Jákup hevur ikki bara fingist við skrivstovuhald og verið aktivur í fakfelagsvirksemi.

Í mong ár hevur hann eisini verið virkin í Klaksvíkar Hornorkestri.

Tá móttøkan fyri Jákupi Sólstein í kantinuni á Kósavirkinum leið móti endanum, kom Klaksvíkar Hornorkestur og setti sín serstaka dám á endan av hesi løtu, sum bæði var væl møtt og í allar mátar væl eydnað.

---



# Stór fjøld heilsaði nýggja stjóranum

Seinnapartin fríggjadagin var móttøka í Norðoya Sparikassa í Klaksvík. Høvið var, at nýggjur stjóri varð settur í sparikassanum í mars mánað, tá ið Eyðfinn Reyðberg fór úr starvi, og Marner Mortensen fyrst varð settur sum fyribilsstjóri og síðani varð settur sum stjóri.

Tá ið hann beyð vælkomið, segði formaðurin í nevndini, John Danielsen, at ætlanin hevði verið at havt móttøkuna fyrri enn so, men orsaka av stóra arbeiðstrýstinum, sum hevur verið í sparikassanum í sambandi við at føroysku peningastovnarnir hava fingið nýggjan KT veitara, so hevði tað ikki borið til at skipa fyri móttøkuni fyrrenn nú.

Jákup Ziskason stóð fyri tí kulinariska, og hýrurin var góður á teimum mongu, sum í góðveðrinum fríggjadagin vóru inni á gólvinum í Norðoya Sparikassa – klaksvíkingar og norðoyingar, fólk aðra staðni frá í landinum, nevnd og umboðsráð, umboð fyri fakfeløg, vinnufeløg og politiska myndugleikan á staðnum og landsmyndugleikan, privatkundar og vinnukundar og familja og vinir.

Umframt John Danielsen, nevndarformann, so bóru eisini Jógvan Skorheim, varaborgarstjóri í Klaksvíkar kommunu, Jóannes Hansen, næstformaður í nevndini í Norðoya Sparikassa, og Karl Birgir Isaksen, stjóri í KBI, heilsanir fram, og Marner Mortensen, stjóri, takkaði fyri. Marner Mortensen, sum er ættaður úr Sørvági, hevur búð í Klaksvík í 24 ár, og hann hevur arbeitt í Norðoya Sparikassa í 14 ár.

Gunnar Nolsøe hevði mikrofonina undir hond, Magni Husgaard spældi hugnaligar tónar, og haraftrat vóru tvær framførslur. Limir í Klaksvíkar Hornorkestri spældu tveir sálmar, og Hallur Joensen, countrykongurin, spældi og sang.